umhvørvisstovan

EYSTURKOMMUNA

POSTBOX 30
512 NORÐRAGØTA
FØROYAR

Argir hin 21. februar 2012
Málsnr.: 11/00014-21
Tykkara málsnr.:
Málsviðgeri: Heidi Hansen

**Spillivatnsætlanin góðkend**

Við hesum skal verða boðað frá, at Umhvørvisstovan hin 21.02.2012, sambært § 18, stk. 2 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, við seinni broytingum, og § 4, stk. 2 í kunngerð nr. 111 frá 7. september 2009 um spillivatn, hevur góðkent spillivatnsætlanina hjá Eystur kommunu fyri tíðarskeiðið 2011-2015.

## 1. Umsókn og viðgerð

Umhvørvisstovan fekk hin 21.12.2011 spillivatnsætlanina hjá Eystur kommunu til góðkenningar (mál nr. 11/00014-6). Ætlanin er gjørd av Pb Consult, ráðgevandi verkfrøðingum, men hevur kommunan á býráðsfundi tann 16. desember 2011 samtykt spillivatnsætlanina, ið Pb Consult hevur gjørt (mál nr. 11/00014-7). Í samband við viðgerðina av ætlanini, hevur Umhvørvisstovan verið í samband við kommununa, Pb Consult, Luna og matvørudeildina hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, og tann 21.02.2012 fekk Umhvørvisstovan eina dagførda ætlan (mál nr. 11/00014-20) til góðkenningar. Henda dagførda ætlan er eisini góðkend av Luna og Matvørudeildini hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni (mál nr. 11/00014-.19)

Út frá eini heildarmeting av upplýsingunum í dagførdu ætlanini (mál nr. 11/00014-20), verður mett, at komandi spillivatnsskipan í kommununi lýkur ásetingarnar í §§ 8-13 í kunngerðini um spillivatn. Hetta merkir, at spillivatnsætlanin m.a. fevnir um spillivatn frá øllum húsarhaldum, virkjum og virksemi í kommununi, og at spillivatnið eftir reinsing verður leitt gjøgnum lokaða skipan beinleiðis á sjógv við góðum vatnskifti. Sambært spillivatnsætlanini verður spillivatnsskipanin liðug innan 1. januar 2015.

Góðkenningin umfatar einans krøv ásett í spillivatnskunngerðini, t.v.s. tann umhvørivsliga partin av spillivatnætlanini. Góðkenningin tekur ikki støðu til hvørjar tekniskar loysnir eru valdar og um teknisku viðurskiftini sum heild eru í lagi, so sum dimensionering o.s.fr. Hetta er ábyrgdin hjá kommununi.

Um tað seinni vísir seg, at spillivatnsskipanin elvir til dálking, t.d. uppsavnan av evnum og tilfari, til slóðir í sjónum ella til aðrar broytingar í umhvørvinum, skal kommunan, sambært § 10 stk. 3 í kunngerðini um spillivatn, fremja bøtandi atgerðir, so sum økta reinsing ella føra spillivatnið longur út.

## 2. Kunngerð og kæra

Góðkenningin av spillivatnsætlanini verður lýst á heimasíðu okkara og við almennari lýsing, har tað eisini verður kunnað um at góðkenningin, sambært § 60, stk. 2 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, við seinni broytingum, kann kærast til landsstýrismannin við umhvørvismálum innan 4 vikur frá at góðkenningin er alment kunngjørd.

Kærurætt hava einstaklingar, feløg o.o., sum avgerðin hevur týðandi persónligan ella vinnuligan týdning fyri.

Suni Petersen, settur deildarleiðari

/

Heidi Hansen, umhvørvisviðgeri

Avrit: Pb Consult, Heykavegur 6b, Postmoga 1395, FO-110 Tórshavn